gult26 cyan26 magenta26 svart26



VIÐMERKINGAR

# Skrivligur fyrispurningur til løgmann viðvíkjandi Vága Floghavn

**Sune Jacobsen**



Undirritaði setti í tinginum í vikuni ein munnligan fyrispurning til løgmann um Vága Floghavn.

Av tí at tíðin at svara munnligum fyrispurningum er avmarkað til 6 minuttir, heitti løgmaður á undirritaða at seta fyrispurningi fram skrivliga. Tað ber av góðum grundum ikki til, av tí at mín tíð í tinginum fyri Marjus Dam var lokin. Eg boðaði frá, at eg vildi seta spurningin fram í bløðunum, og tað verður hervið gjørt. So stendur tað upp til løgmann, um eg fái svar.

Fyrispurningur ljóðaði soleiðis:

Hvørjar útbyggingar hevur landsstýrið ætlanir um at fremja á flogvøllinum í Vágum, og hvussu eru tær raðfestar á langtíðarfíggjarætlanini ?

Viðmerkingar :

Landsstýrið, ið sat í tíðarskeiðnum frá 1994-1998, gjørdi eitt miðvíst arbeiði fyri at bøta um viðurskiftini á flogvøllinum í Vágum.

Í 1996 valdu landsstýrið og danska ferðslumálaráðið eina nevnd at kanna møguleikarnar fyri at betra um flogvallarviðurskiftini í Vágum. Í 1997 varð glíðibreytarútbúnaður royndarkoyrdur, sum virkaði sum hann skuldi.

Táverandi løgmaður, Edmund Joensen, sigur í svari upp á fyrispurning frá Tordi Niclasen um flogvallarmálið so seint sum 11. februar 1998, at hann hevur bjóðað danska ferðslumálaráðharranum til Føroya at greiða málið um útbyggingina endaliga.

Síðani henda samgongan tók við, hevur almenningurin bert fingið ørkymlandi útmeldingar frá landsstýrinum. Einki oyrað er sett av á fíggjarlógina, sjálv um leiðslan á flogvøllinum hevur boðað frá alment, at tørvur á støðuplássum til tyrlur, flúgvarar og bilar er akuttur. Harumframt lýkur terminalurin ikki tey krøv, sum nútíðin setur til ein slíkan.

Tá vit bert vita, at Vága Floghavn skal leggjast undir føroyskt málsræði í seinasta lagi 1. januar 2002, hevði tað verið áhugavert at vita, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur á hesum øki og hvussu hesar eru raðfestar á langtíðarfíggjarætlanini.

Á FØROYA LØGTINGI,
3. apríl 2001
**Sune Jacobsen**

Grundin til at eg setti hendan fyrispurning fram er tann, at eg føli meg tíverri sannførdan um, at hendan samgongan hevur ofrað flogvøllin á fullveldisaltarinum. Tað helt eg longu í 1998, tá samgonguskjalið hjá sitandi samgongu varð almannakunngjørt.

Og grundin til tað er, at samgongan í samgonguskjalinum sigur, at hon vil yvirtaka øll málsøki, og tað er brot á ta strategi, sum allir føroyskir samferðsluráðharrar hava havt áðrenn hesa. Teir hava nevniliga ført fram, at málsøki flogferðsla er danskt, og tí er danskt ábyrgdarøki, tá talan er um rakstur og útbyggingar.

Fyrst í 90-unum var Svend A. Ellefsen ferðslumálaráðharri. Tá vildu danskir mynduleikar hava okkum at yvirtaka vøllin sjálvan, men vóru sinnaðir at útbyggja terminalin. Men av tí at ferðafólkatalið fall í stórum árliga av kreppuni, var einki ítøkiligt burturúr hesi ætlan.

Í 1994 gjørdist Sámal P. í Grund ferðslumálaráðharri. Tá kom gongd aftur á málið, og úrslitið av tí arbeiðinum er nevnt í viðmerkingunum til fyrispurningin.

Tá Edmund Joensen hevði yvirtikið málsøkið, sigur ferðslumálaráðið 3. februar 1998, at tað vil greitt hava at vita, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur í flogvallarmálinum. Og Edmund Joensen svarar mynduleikunum aftur, at landsstýrið ynskr flogvøllin longdan 200 m., soleiðis at hann gerst 1450 m., og at fingið verður til vega lendingarhjálparamboð, tvs. glíðibreyt v.m.

Grundin til at komið var so nær eini loysn á flogvallarmálinum á vári 1998 var, at føroyskir myndugleikar áhaldandi høvdu víst á, at loftferðsla var danskt ábyrgdarøki, og at danska ferðslumálaráðið hevði ábyrgd av, at vøllurin tekniskt og á annan hátt, er á so høgum støði sum gjørligt.

Nú, trý ár eftir, er als einki hent uttan tað, at samgongan í fullveldisrúsi hevur boðað stjórnini frá, at hon vil yvirtaka málsøki 1. januar 2002.

# Afturhaldið er sett skák mát

**Áki Andreasen**

Tað er eitt sindur keðiligt at sita í andstøðu í Føroyum. Serliga tá prátið kemur inn á sjálvstýrispolitikk, tí tað er sum um at ongar grundgevingar eru eftir – tær hava nú ikki verið tær nógvu, fyri tað mesta er tað farið eftir persónum heldur enn at halda seg til sjálvt evnið.

Um vit hugsa um alla fullveldistilgongdina frá byrjan til dagin í dag, so kunnu vit róliga siga, at unur er á hvar ætlanin var, og hvat nú liggur á borðinum – men endamálið er tað sama – men tað hevði tað ikki verið, um ikki Tjóðveldisflokkurin sat í Tinga nesi, og tað er helst hetta, sum pínir báðar teir stóru sambandsflokkarnar í andstøðuni.

### Er nú friður í Fólkaflokkinum?

Eina tíð sá tað svart út; fólkaflokkurin breyt allar gjørdar avtalur – sambandskreftirnar í hesum flokki hóvreiggjaðu sær og kendu sær einki afturhald; hótt við hesum og hasum, skommin mundi ongan enda tikið, tá grundgevingarnar vóru so veruleikafjarar, at spurningurin er, um tað ikki hevði verið betur at tær als ikki blivu sagdar.

Sjálvstýrissinnaði fólkafloksveljarin spyr helst, um hesir sambandsheykarnir í flokkinum hava fingið greitt at vita, hvar skápið skal standa, ella um vit kunnu vænta, at sjálvstýrisætlanin enn einaferð loypir hvøkk á teir, tá alt byrjar at gerast álvara. Tað er so lætt at tosa við stórum stavum, men tað sum eftirtíðin stendur eftir við, eru avgerðirnar og drivið at føra gjørdar avtalur út í lívið.

Tað er ikki júst tað, sum hevur eyðkent Fólkaflokkin, men vit sum síggja tað sum eina avgerandi treyt fyri sunnari menning og ábyrgdarkenslu, at Føroyar gerast sjálvstøðugar, vit vóna at Fólkaflokkurin ger greitt fyri sínum limum og veljarum, at framyvir er ætlanin at fáa samband millum orð og gerðir, og at tað framyvir er týdningarmikið at arbeiða eftir tí, sum upprunaliga var ætlanin við flokkinum.

### Afturhaldið sá ein møguleika…

Tá alt hetta rokilsið stóð upp á spæl, væntaði afturhaldið í Føroyum, at nú var sloppið, Tjóðveldisflokkurin hevði gjørt ein brølara við at bera uppskotini niðan í Løgtingi, nú var bara at bíða … og afturhaldið bíðar enn.

Ein av høvuðsgrundgevingunum fyri at afturhaldið ikki slapp framat, var jú tann, at uppskotini blivu borin niðan; hevði tað ikki blivið gjørt var fullveldisætlanin øll sum hon var dottin á gólvið, alt trúvirði burtur og leiðin fyri afturhaldispolitikkinum greið!

Eingin hevði helst væntað, at Tjóðveldisflokkurin og Høgni Hoydal mettu fullveldisendamálið hægri enn persónligt stórlæti, og hóast Tjóðveldisflokkurin saman við Sjálvstýrisflokkinum helt seg til tær avtalur, sum blivu gjørdar, so valdi flokkurin at royna enn einaferð, uppskotini blivu ikki løgd fram – politikkurin sigraði! Síðan komu flokkarnir til eina semju, sum setti afturhaldið fullkomiliga skák mát.

Møguleikin hjá afturhaldinum í hesum landinum var fokin á hesum sinni, og vónandi fyri alla framtíð.

### Nýggi leisturin kann verða avdúkandi

Við nýggja leistinum verða ávísir politikarar og flokkar settir í eina støðu, sum kann gerast rættiliga avdúkandi.

Fyri tað fyrsta, so er tað upp til Fólkaflokkin at prógva, um hann meinar nakað sum helst við tann sjálvstýrispolitikk, hann hevur breggjað sær av nú í longri tíð. Skadda umdømið hjá flokkinum ger helst, at okkurt fer at henda; hetta er tó fyrst og fremst ein trupulleiki í Fólkaflokkinum, men ein uppgerð er helst ikki so langt burtur. Men enn siga teir seg kunna standa aftan fyri henda leistin, tað mugu vit so taka fyri góða vøru…

Henda ætlanin er soleiðis skrúvað saman, at Javnaðarflokkurin væl og virðiliga kann taka undir við henni; men Føroya Javnaðarflokkur er nú í hesi tvístøðu, at Poul Nyrup og stjórnin ikki rættiliga vilja geva til kennar hvat mótspæl er í væntu; andstøðan í Fólkaflokkinum er heldur ikki so rørandi samd um hvat niðurstøðan skal vera.

So nú stendur Javnaðarflokkurin og veit hvørki út ella inn; hetta kom eisini týðuliga til sjóndar undir fyrstu viðgerð av uppskotinum hjá landsstýrinum um »Sjálvstýri Føroya fólks«. Milliardin er sjálvandi altíð ein neyðbremsa; eitt annað kundi sjálvandi verið vert at hildið seg til, nevniliga tað sum flokkurin segði undan seinasta løgtingsvali, og annars hvat er blivið sagt síðan í sjálvstýrismálinum; men tað er aftur hetta við orðum gerðum…

### Nú er at fara til verka

Eg haldi at samgongan við hesi semjuni hevur víst, at hon heldur til stóran mótgang, og tað er týdningarmikið – tí eitt frælsisstríð hevur ongantíð verið eitt lætt stríð her hjá okkum ella aðrastaðni í heiminum.

Tað, sum liggur fyri framman er hart arbeiði, og eitt tað týdningarmesta í hesum arbeiði er, at flokkarnir á Føroya Løgtingi leggja partapolitiska aggið á hillina – tað hevur Høgni Hoydal fleiri ferðir staðiliga mælt til, men tá grundgevingarnar ikki røkka, so verða onnur amboð nýtt, eitt nú partapolitiskt og persónligt agg!

Leisturin, sum nú fyriliggur, skuldi ikki verið nakar kamelur at slúkt hjá nøkrum politiskum flokki – uttan Sambandsflokkinum sjálvandi.

Vit kunnu einki gera við tey skuffaðu fólkafloksfólkini, sum helst høvdu roknað við at sjálvstýriskreftirnar í teirra egna flokki vóru eitt sindur sterkari, enn tað so seinni skuldi vísa seg, men tað er fyrst og fremst ein »fólkaflokstrupulleiki«. So nú er at fara til verka.

Hjá okkum, sum meta at einar frælsar Føroyar eru ein fyritreyt fyri sunnari samfelagsmenning, har avgerðir og ábyrgd fylgjast – fyri okkum er tað eingin trupulleiki, um danir hótta við hesum og hasum; vit hveppa okkum ikki við at krevja okkara sjálvsagda rætt til okkara land, vit ganga ikki við einum »frælsisskelti« um hálsin, fyri síðan at taka tað burtur, tá farast skal til verka. Fyri okkum er tað ein sjálvfylgja, at vit vilja stríðast – fyri okkum eru einar frælsar Føroyar lykilin fyri at koma víðari og verða til reiðar til tær avbjóðingar, sum framtíðin bjóðar okkum.

gult27 cyan27 magenta27 svart27



# Umsetilig fiskirættindi

**Fiskimálaráðharrin ger nógv burturúr umsetiligheitini í fiskirættindunum í frágreiðingini, sum hann hevur skrivað til aðalorðaskifti í løgtinginum um ein greiðan fiskivinnupolitikk.**



*Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri er heitur talsmaður fyri umsetiligheit í fiskirættindum.*

Jørgen Niclasen vil hava so fría umsetiligheit sum møguligt er avjgjørt ikki fyri, at fiskiloyvir verða knýtt at ávísum støðum í landinum orsakað av økismenning. Niðanfyri prenta vit tað hann skrivar um umsetiligheit í fiskirættindum.

»Grundgevingarnar fyri skipanum við umsetiligum fiskirættindum eru sprotnar úr sjónarmiðunum um, at tá ein marknaður sleppur at virka frítt, førir hetta við sær, at samfelagstilfeingið verður gagnnýtt á búskaparliga skynsamasta hátt.

Við at geva vinnuni møguleikar at keypa og selja tillutaðar kvotur ella fiskidagar, hugsar ein sær, at sum frá líður verður flotin í størri mun lagaður til veiðimøguleikarnar.

Kappingarføri og lønsemi skal tryggjast við, at tey útgerðarfeløg, ið vera best rikin, umsita veiðirættindini. Tillagingin skal fara fram eftir marknaðarbúskaparligum leikreglum. Høvuðsuppgávan hjá myndugleikunum er at tryggja skynsama røkt av fiskastovnunum, og at seta karmarnar fyri umsitingina av fiskirættindunum.

Landsstýrismaðurin fer at virka fyri, at møguleikar framhaldandi vera fyri, at fiskirættindi kunnu keypast og seljast. Hildið verður, at hetta er frægasta amboð at nýta, til tess at røkka búskaparligu endamálunum í fiskivinnupolitikkinum.

Ásannað verður tó, at hóast ein skipan við fríum handli við fiskirættindum hevur sínar fyrimunir, so kann hon hava óhepnar avleiðingar. Eitt nú, at fiskirættindini verða miðsavnaði. Tí vera avmarkingar lagdar á møguleikarnar at keypa og selja, og á tann hátt tryggja, at fyrimunirnir við skipanini gerast sjónligari enn vansarnir.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fer at virka fyri, at møguleikar vera fyri at leggja saman og flyta veiðiloyvi, og at umseta fiskirættindi innan bólkar av fiskiførum. Skipanin skal tó broytast soleiðis, at trolbátar, partrolarar og møguliga lemmatrolarar frítt kunnu keypa og selja fiskirættindi sínámillum. Fiskifør omanfyri 15 tons, ið royna við húki, kunnu frítt keypa og selja sínámillum.

Markið í sambandi við flyting og samanlegging av veiðiloyvum verður flutt niður á 15 tons, soleiðis at tað ikki skal bera til at flyta fiskidagar frá fiskiførum undir 15 tons til fiskifør størri enn 15 tons og øvugt. 10 ára markið, fyri at læna ella leiga fiskidagar og kvotur, verður tikið burtur. Skipanin við at læna ella leiga fiskidagar á landleiðunum, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum, verður varðveitt.

Til tess at forða fyri miðsavning av fiskirættindum verður umhugsað at seta lógarreglur í verk sum áseta, at eingin kann eiga meir enn ávísan part av fiskiflotanum ella av fiskirættindunum.

Harafturat fer dentur at vera lagdur á, at fáa ein skipaðan marknað fyri fiskirættindi. Endamálið er m.a. at tryggja opinleika og gjøgnumskygni.

## Fyrimunir og vansar við umsetiligum fiskirættinum

Ein skipan við umsetiligum fiskirættindum hevur nógvar fyrimunir. Men samstundis kann ein slík skipan hava óhepnar avleiðingar við sær. Niðanfyri verður tikið samanum fyrimunir og vansar við umsetiligum fiskirættindum.

### Fyrimunir

• Kostnaðurin av at fáa fiskin úr sjónum minkar, við tað, at tey skipini, sum verða best rikin, skulu umsita veiðirættindini

• Samansetingin av flotanum verður optimalari við tað, at fiskiflotin verður búskaparliga tillagaður, og eingin stórvegis yvirkapasitetur verður í flotanum

• Størri veiða pr. eind, tí talið av fiskiførum verður minni

• Av tí at roknast kann við, at vinnan fer at kasta meira av sær í eini skipan, har fiskimøguleikar kunnu keypast og seljast, verður grundarlagið undir nýíløgum í veiðitól betri. Nýggjari fiskifør hava vanliga betri fysiskar arbeiðsumstøður umborð, og hetta hevur týdning fyri trivnaðin, sum aftur hevur týdning fyri kappingarstøðuna hjá fiskiflotanum á arbeiðsmarknaðinum.

• Smidlig skipan, sum gevur fiskiflotanum betri møguleikar at tillaga seg til broyttar umstøður

• Ein skipan við umsetiligum fiskirættindum ber í sær, at nógvar avgerðir, sum hava týdning fyri úrslit og býti, verða latnar vinnuni. Lagt verður upp til miðspjadda stýring av fiskiveiðini, sum eitt alternativ til miðsavnaða politiska smálutastýring

### Vansar

• Fiskirættindi kunnu miðsavnast

• Kann verða tyngri hjá ungum fólki, ið vilja royna seg í vinnuni, at sleppa framat, um prísurin á veiði- og fiskiloyvum er ov høgur.

• Ov høgir prísir á veiðirættindum kunnu føra við sær, at skuldarbyrðan hjá fiskiførum verður tung at bera.

• Grundað á royndirnar aðrastaðni, kann fríur handil við fiskirættindum føra við sær, at bygnaðurin í fiskiflotanum á heimaleiðum verður broyttur soleiðis, at eindirnar verða færri og størri. Talið av arbeiðsplássum kann gerast færri.

## Møguleikar fyri umseting

Seinastu árini hevur lógin um vinnuligan fiskiskap verið broytt soleiðis, at møguleikarnir fyri umseting av fiskirættindum eru vorðnir rúmari. Eftir galdandi reglum er tó ikki talan um fría umsetiligheit millum fiskifør ella bólkar av fiskiførum. Eitt nú er skott sett millum útróðrarflotan og størru førini og millum húk og trol.

Sum longu nevnt kunnu fiskirættindi skifta eigaravarandi, ella í avmarkað tíðarskeið, við heimild í trimum ásetingum í lógini:

1. Eftir § 8 kunnu fiskirættindi verða flutt millum fiskifør, tá veiðiloyvi verða flutt ella løgd saman. Tó er ikki loyvt at flyta veiðiloyvi frá fiskifar, ið er minni enn 40 tons til fiskifar størri enn 40 tons og øvugt. Í hesum føri fylgja fiskirættindini endaliga við.

2. Fiskidagar og kvotur kunnu sambært §§ 14 og 15 í lógini umsetast upp til 10 ár í senn innan fyri undirbólkarnar t.e. bólkarnir 2, 3, 4A, 4B og 5.

3. Fiskidagar kunnu vera læntir ella leigaðir í sama fiskiári millum høvuðsbólkarnar, t.e. bólkarnir 2, 3, 4 og 5, undantikið frá bólki 5 til hinar bólkarnar, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum. Fiskidagar í høvuðsbólki 4 kunnu ikki latast frá húki til trol.

## Umseting og rættindi

Sambært § 2, stk. 1, 1. pkt. í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap verður staðfest, at livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið, ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, er ogn Føroya fólks.

Í § 3, stk. 2 verður haraftturat sagt, at – fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rættindi til fiskiskap takast aftur uttan endurgjaldsskyldu.

Tá skipanin við veiðiloyvum varð sett í gildi í 1987, staðfesti hetta rættin hjá summum at fáa skip og rættin til at veiða á føroysku landleiðunum, og til tey rættindi, sum Føroyar hava samráðst seg til.

Hóast útgangsstøðið sostatt er, at fiskatilfeingið á føroysku landleiðunum og føroysk rættindi aðrastaðni er ogn Føroya fólks, so hevur landsstýrið, av Føroya Løgtingi, fingið heimild at umsita ogn Føroya fólks sambært lógini um vinnuligan fiskiskap.

Til tess at tryggja, at tilfeingið verður skynsamiliga gagnnýtt, er tí neyðugt at avmarka atgongdina til vinnuna og seta hámark fyri, hvussu nógv verður fiskað ella avmarkað royndina við fiskidøgum o.ø. Fiskirættindini verða tí latin einstaklingum ella feløgum sum serlig loyvi, har tilskilað er, hvar loyvishavarin kann fiska, hvørji fiskasløg, hvussu nógv ella hvussu nógvar dagar. Fiskiloyvini eru tí at roknað sum ein nýtslurættur.

Hetta kemur eisini til sjóndar aðrastaðni í lógini m.a., at kvotur og fiskidagar ikki kunnu setast í veð (jbr. § 14, stk. 4 og § 15, stk. 3). Harumframt verður hetta týðuligari sagt í viðmerkingunum í fyrsta uppskotinum til løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap (løgtingsmál nr. 51/1993).

Seinastu árini er lógin um vinnuligan fiskiskap broytt soleiðis, at møguleikarnir fyri handli við fiskidøgum og kvotum eru vorðnir rúmari. Sitandi samgonga hevur harafturat gjørt semju í samgonguskjalinum um, at støðd og røtt samanseting av veiðiflotanum verður best tryggjað við, at fiskidagar og kvotur verða so umsetilig sum gjørligt. Undantikin er tó útróðrarflotin undir 15 tons.

Spurningurin um ræðisrættin til fiskiloyvið, sum myndugleikarnir útskriva, hevur týdning fyri at fáa ein marknað við fiskirættindum at virka. Tað er umráðandi, at keypari og seljari hava ræðisrættin yvir tillutaðum ella útvegaðum fiskidøgum/kvotum. Eru viðurskiftini við fiskiloyvum ógreið, kann hetta í sjálvum sær verða ein forðing fyri, at skipanin kann virka eftir ætlan.

## Stevna

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fer at virka fyri, at semjan í samgonguskjalinum um, at stødd og røtt samanseting av veiðiflotanum verður best tryggjað við, at fiskidagar og kvotur verða so umsetilig sum gjørligt, verður sett í verk, soleiðis at fiskirættindi frítt kunnu umsetast millum bólkar av fiskiførum, útróðrarflotin undir 15 tons undantikin.

Miðað verður við hesum ímóti at røkka búskaparligu stevnumiðini í fiskivinnupolitikkum, og at tillagingin í flotanum, í so stóran mun sum gjørligt, fer fram undir marknaðartreytum og leys av politiskari smálutastýring.

Karmarnir um skipanina við keyp og sølu av fiskirættindum verða broyttir. Endamálið er at gera skipanina greiðari og at tryggja, at vansarnir ikki gerast sjónligari enn fyrimunirnir. Hetta skal gerast við hesum tiltøkum:

• Møguleikar skulu vera fyri at leggja saman og flyta veiðiloyvi, og at umseta fiskirættindi innan bólkar av fiskiførum. Skipanin skal tó broytast soleiðis, at trolbátar, partrolarar og møguliga lemmatrolarar frítt kunnu keypa og selja fiskirættindi sínámillum. Fiskifør omanfyri 15 tons, ið royna við húki, kunnu frítt keypa og selja sínámillum.

Markið í sambandi við flyting og samanlegging av veiðiloyvum verður flutt niður á 15 tons, soleiðis at tað ikki skal bera til at flyta fiskidagar frá fiskiførum undir 15 tons til fiskifør størri enn 15 tons og øvugt. 10 ára markið, fyri at læna ella leiga fiskidagar og kvotur, verður tikið burtur. Skipanin við at læna ella leiga fiskidagar á landleiðunum, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum, verður varðveitt.

• Fyri at fáa sum mest burturúr skipanini verður neyðugt at taka 10 ára markið, fyri umseting av kvotum og fiskidøgum, ásett §§ 14 og 15 í lógini um vinnuligan fiskiskap, burtur. § 13 í lógini verður óbroytt.

• Loyvishavari, sum hevur fingið tilsøgn um annað skip, samsvarandi § 8 í lógini, skal ikki kunna selja øðrum fiskirættindi, so leingi hann einki skip hevur.

• Tey, ið fáa útskriva fiskiloyvi, skulu hava eina ávísa brúksskyldu. Endamálið er bæði at tryggja, at fiskimøguleikar ikki liggja óbrúktir, og at forða fyri »fiskirættindabarónum«, tvs., at tað skal ikki vera møguligt at fáa útskriva fiskiloyvi ár um ár, bert fyri at leiga tey út ella selja. Hetta ber í sær, at óbrúkt rættindi, eftir nærri ásettum reglum, verða inndrigin.

• Settar verða lógarreglur, sum skulu forða fyri, at fiskirættindi verða savnað á fáum hondum, eitt nú soleiðis, at eingin einstaklingur ella felag kann eiga ella hava ræði yvir meira enn einum ávísum prosentparti av samlaðu fiskidagatalinum ella kvotum.

•
Stovnaður verður ein skipaður fiskirættinda marknaður, har keyp og søla kann fara fram og har øll viðurskifti við rættindum, íroknað keyp og søla, skal skrásetast. Endamálið er at tryggja opinleika og gjøgnumskygni í keyp og sølu av fiskirættindum.